# Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 33

ISSN 0907-905X


Nr. 109 29. august 2011

**Kunngerð**
**um**
**próvtalsstiga og aðra døming í fólkaskúlanum**

Við heimild í § 16, stk. 2 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verður ásett:

**§ 1.** Næmingur, sum til próvtøkur og royndir skal prógva eitt kunnleika- og førleikastig, verður mettur sambært próvtalsstiganum niðanfyri, sbr. tó § 9:
12: fyri framúr gott avrik
10: fyri sera gott avrik
7: fyri gott avrik
4: fyri hampiligt avrik
02: fyri toluligt avrik, sum kann verða góðtikið
00: fyri ikki nøktandi avrik
-3: fyri heilt vánaligt avrik
*Stk. 2.* Eftirmetingar, royndir og próvtøkur fara fram sambært reglunum í kunngerð um próvtøkur fólkaskúlans.
*Stk. 3.* Próvtalsstigin verður nýttur, tá ið ársmet og støðumet verða givin.

**§ 2.** 12: Verður givið fyri avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

**§ 3.** 10: Verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini í námsætlanini í lærugreinini.

**§ 4.** 7: Verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

**§ 5.** 4: Verður givið fyri hampiligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl í námsætlanini í lærugreinini.

**§ 6.** 02: Verður givið fyri toluligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

**§ 7.** 00: Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

**§ 8.** -3: Verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið.

*Onnur døming*

**§ 9.** Skrivligt ummæli og/ella talmet verða nýtt í sambandi við verkætlanaruppgávu sambært lógini.

*Próvtalsgeving*

**§ 10.** Tá ið ein próvtøka er byrjað, verður próvtal givið, uttan so at próvtøkan verður slitin orsakað av burturvísing ella sjúku. Er orsøkin sjúka, verður próvtal givið í sambandi við sjúkrapróvtøku.

**§ 11.** Próvtøkuavrik verða mett samsvarandi teimum fakligu málunum, ið eru sett í námsætlanini, fyri ávísu lærugreinina ella fakligu og verkligu undirvísingargongdina.

**§ 12.** Í føroyskari rættskrivingaruppgávu í 9. fl. og skrivligum enskum í 9. og 10. fl. verða heildarpróvtøl givin.
*Stk. 2.* Rættskrivingaruppgávan fatar um rættskriving og mállæru; rættskriving telur 2/3 og mállæran 1/3.
*Stk.* 3. Skrivligt enskt fatar um málviðgerð og framseting; málviðgerð telur ¼ og framseting ¾.
*Stk. 4.* Heildarpróvtølini verða hækkað ella lækkað til næsta próvtal á próvtalsstiganum. Hækkað verður, um miðaltalið er mitt ímillum tvey próvtøl.

*Prógv og skjalaváttanir*

**§ 13.** Á prógvum og skjalaváttanum skulu øll próvtøl sambært próvtalsstiganum verða lýst við samsvarandi bókstavi frá ECTS-stiganum sbr. fylgiskjali 1.

*Undantak og frávik*

**§ 14.** Mentamálaráðið kann víkja frá hesi kunngerð, tá ið talan er um serlig viðurskifti.

*Stk. 2.* Mentamálaráðið kann loyva, at vikið verður frá reglunum í hesi kunngerð, tá ið talan er um eitt frammanundan góðkent royndar- og menningarvirksemi.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 15.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. august 2011.

*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 99 frá 14. november 1980 um próvtalsstiga, tó soleiðis, at nevnda kunngerð framvegis er galdandi fyri næmingar í 9. flokki skúlaárið 2011/12 og fyri næmingar í 10. flokki skúlaárini 2011/12 og 2012/13.

Mentamálaráðið, 29. august 2011

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

**Fylgiskjal 1**

**Próvtalsstigin týddur til enskt**
12: For an excellent performance displaying a high level of command of all aspects of the relevant material, with no or only a few minor weaknesses.

10: For a very good performance displaying a high level of command of most aspects of the relevant material, with only minor weaknesses.

7: For a good performance displaying good command of the relevant material but also some weaknesses.

4: For a fair performance displaying some command of the relevant material but also some major weaknesses.

02: For a performance meeting only the minimum requirements for acceptance.

00: For a performance which does not meet the minimum requirements for acceptance.

-3: For a performance which is unacceptable in all respects.

**Samband millum próvtalsstigan og ECTS-stigan**

Próvtalið 12 í próvtalsstiganum svarar til A á ECTS-stiganum
Próvtalið 10 í próvtalsstiganum svarar til B á ECTS- stiganum
Próvtalið 7 í próvtalsstiganum svarar til C á ECTS- stiganum
Próvtalið 4 í próvtalsstiganum svarar til D á ECTS- stiganum
Próvtalið 02 í próvtalsstiganum svarar til E á ECTS- stiganum
Próvtalið 00 í próvtalsstiganum svarar til Fx á ECTS- stiganum
Próvtalið -3 í próvtalsstiganum svarar til F á ECTS- stiganum

**Umseting til enskt frá próvtalsstiganum til ECTS-stigan**

The mark 12 on the scale is identic with A at the ECTS scale
The mark 10 on the scale is identic with B at the ECTS scale
The mark 7 on the scale is identic with C at the ECTS scale
The mark 4 on the scale is identic with D at the ECTS scale
The mark 2 on the scale is identic with E at the ECTS scale
The mark 00 on the scale is identic with Fx at the ECTS scale
The mark -3 on the scale is identic with F at the ECTS scale

## Kunngerð um broyting í kunngerð um próvtøkur fólkaskúlans

### § 1

Í kunngerð nr. 22 frá 14. mai 2008 um próvtøkur fólkaskúlans verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 40 verður orðað soleiðis: „Í sambandi við próvtalsgeving, royndir og árs- og støðumet verður kunngerð um próvtalsstiga og aðra døming í fólkaskúlanum brúkt.“

2) Í § 42, stk. 2, verður í seinasta pkt. „00“ broytt til „-3“.

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. august 2011.
*Stk. 2.* § 1, nr. 1 og nr. 2 eru tó ikki galdandi fyri næmingar í 9. flokki skúlaárið 2011/12 og næmingar í 10. flokki skúlaárini 2011/12 og 2012/13.

Mentamálaráðið, 29. august 2011

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705